# Føtur í fat



Ferðafólkini, sum koma úr Bretlandi, skulu stíga í ein bakka við sóttreinsandi løgi, áðrenn tey sleppa av flogvøllinum

Mynd: Edvard Joensen

**Ferðafólkini, sum koma við flogfarinum hjá Atlantsflog úr Aberdeen, skulu ígjøgnum eitt fat við sóttreinsandi løgi, áðrenn tey sleppa av vøllinum**

SÓTTVERJA
*Edvard Joensen*

**Á flogvøllinum hóskvøld klokkan 21.00:** H ó a s t kunngerðin, um verju móti munn- og kleyvsóttini ikki er komin í gildi í Føroyum enn, verða ferðafólk, sum koma við Atlantsflog úr Skotlandi, kortini sóttreinsað, áðrenn tey fara av flogvøllinum.

Tað er hóskvøld, flogfarið hjá Atlantsflog kemur spakuliga koyrandi inn eftir flogvøllinum. Tað hevur júst sett seg, afturkomið úr Aberdeen í Skotlandi. Við í ferðini eru fólk, sum hava verið á oljumessu í oljuhøvuðsstaðnum við Norðsjógvin.

Men tey hava eisini verið í tí landinum, sum meinast er rakt av munn- og kleyvsóttini, sum nú eisini er farin at herja á europeiska meginlandinum. Og tí skulu tey sóttreinsast, áðrenn tey sleppa heim.

Tað kemur ein maður út á vøllin við einum vogni. Á vogninum standa tvey føt, sum hann setir framman fyri báðum landgongdunum, sum settar verða upp móti flogfarinum. Eina annar maður kemur við eini spann við reinsandi løgi, sum hann stoytir í føtini, áðrenn ferðafólkini fáa loyvi at koma niður trappurnar.

Tey steðga á, so hvørt tey koma til karið. Stíga upp í og verða standandi nøkur sekund, áðrenn tey fara víðari.

So einføld er hendan viðgerðin, sum kortini helst skal gera, at hendan herviliga sjúkan ikki kemur inn í landið.

Tað eru tó tey, sum halda, at hendan viðgerðin er ikki nokk kortini. Tey vilja halda, at vit eiga at krevja, upp aftur strangari tiltøk. Men soleiðis eru tey nú einaferð, tiltøkini, og verður ivaleyst hildið, at hetta man vera nokk. Tí flutningsfeløgini siga seg enn í skrivandi stund ikki hava fingið nøkur boð um at herða tiltøkini.

Og tað kann undra, siga fólk á flogvøllinum, at ferðafólkini skulu ígjøgnum hesi føtini, hóast tað er púra beint, sum tikið verður til. Tað er ikki tað, sum undrar.

Tey undrast tvørtur í móti á, at einki verður gjørt við sjálvt flogfarið. Tí tað koyrir jú eftir eini breyt í Skotlandi, og har kann tað sama vera smitta, sum á eini gongugøtu inni í býnum, verður víst á.

Men enn siga tey seg ikki hava fingið nøkur boð um at sóttreinsa flogfarið.

# Tórshavnar Skipasmiðja byggir uppí



Bygt verður upp í smiðjuhøllina á Tórshavnar Skipasmiðju

Mynd: Jens K. Vang

**Bygt verður upp í nýggju smiðuhøllina hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Tað er gott at hava soleiðis, sigur stjórin**

ÍDNAÐUR

– Tað er altíð gott at vera undir taki, tá man arbeiðir í Føroyum, er viðmerkingin frá stjóranum á Tórshavnar Skipasmiðju, Poul Mohr, til útbyggingina, sum nú er í gongd.

Hann sigur, at talan er um eina víðkan, sum hevur verið ætlað eina tíð, men bara verður gjørd nú, tí tað nú liggur fyri.

Ætlandi verður hesin parturin brúktur bæði til goymslu og framleiðsluhøll, sigur Poul Mohr.

Tá hendan uppíbyggingin er liðug, eru 2.800 fermetrar undir taki á Skipasmiðjuni, umframt eina stóra høll upp á 5.000 fermetrar inni á Sandvíkarhjalla, sigur Poul Mohr.

Tað vaksandi virksemið á Skipasmiðjuni skundar undir, sigur Poul. Og hann dylur heldur ikki fyri, at hann ætlar ikki at gevast við at blanda seg uppí, fyri tí um ein komandi oljuútgerðahavn verður løgd í Runavík.

Tórshavnar Skipasmiðja fer altíð at vera við í kappingini, sigur hann, og leggur dent á, at teir nokk skulu sleppa upp í part hjá teimum veitingarfeløgum, sum skulu hava okkurt gjørt í Føroyum, tá farið verður undir at leita í summar.

**ej**



# Danski løgmálaráðharrin: Danir eiga føroysku oljuna

**Tað var sjálvur danski løgmálaráðharrin, Frank Jensen, sum mikudagin slóð fast í danska Fólkatinginum, at tað eru danir, sum eiga ognarrættin til føroysku undirgrundina**

UNDIRGRUNDIN
*Áki Bertholdsen*

Tað eru framvegis danir, sum eiga ognarrættin til ráevnini í føroysku undirgrundini.

Tað slóð sjálvur danski løgmálaráðharrin, Frank Jensen, fast á Fólkatinginum mikudagin.

Danska Ekstrablaðið, sum hevur gjørt nógv burturúr undirgrundarmálinum í seinastuni fylgdi við, tá ið Fólkatingið hevði spurnarorðaskifti mikudagin.

Tá spurdi Peter Skaarup úr danska fólkaflokinum um, Løgmálaráðið enn hevði somu støðu sum tað hevði í 1985.

Tá mettu løgfrøðiligu serfrøðingarnir hjá Løgmálaráðnum, at tað var ósambæriligt við ríkisfelagsskapin at lata føroyingar fáa ognarrættin til undirgrundina.

Í svari sínum staðfesti Frank Jensen, at støðan hjá Løgmálaráðnum var tann sama enn, sum hon var tá.

Sostatt staðfestir løgmálaráðharrin, at tað er Danmark, sum bæði hevur ognarrættin til undirgrundina og yvirvaldsrættin yvir henni og sostatt eisini til oljuríkidømið, sum kanska er í undirgrundini.

Og sambært Ekstrablaðnum hósdagin, vísti hann á, at føroyingar kunnu sostatt heldur ikki lata øðrum undirgrundina, ella avhenda hana til aðrar.

Ekstrablaðið heldur, at hetta er ein staðfesting, sum púra vist fer at vekja ans í Føroyum.



–Tað er danski staturin, sum hevur ognarrættin til ráevni í føroysku undirgrundina. Tað slær sjálvur danski løgmálaráðharrin fast í Fólkatinginum mikudagin. Sostatt hava danir enn einaferð birt uppundir kjak um føroysku undirgrundina

## Nyrup tosar uttanum

Sostatt vísir danski løgmálaráðharrin víst ein heilt annan lit í undirgrundarmálinum enn danska stjórnin higartil hevur víst føroyingum.

Danski forsætisráðharrin er fleiri ferðir spurrdur um føroysku undirgrundina. Men Ekstrablaðið staðfestir, at hann hevur hvørja ferð snúð sær undan at svara ítøkiliga. Ístaðin hevur hann víst á, at yvirvaldsrætturin, sum er eitt meiri sveimandi hugtak, framvegis er hjá danska statinum.

Blaðið vísir eisini á, at í avtaluni, við donsku stjórnina um undirgrundina, sum varð gjørd í 1992, er spurningurin um ognarrættin ikki nevndur.

Í tí sambandinum bað Forsætismálaráðið um eina løgfrøðiliga meting frá Løgmálaráðnum um undirgrundina. Men tá ið Løgmálaráðið hevði skrivað niðurstøðuna, gjørdi Forsætismálaráðið tað heilt óvanliga, at tað noktaði at taka ímóti henni.

## Ósamdir

Sostatt staðfesti Frank Jen'sen, at avtalan um undirgrundina er púra lóglig og í fullum samsvari við grundlógina, tí “føroyingar hava bara fingið tann lóggevandi og tann umsitingarliga myndugleikan yvir undirgrundini”

Men tað eru ikki øll samd um.

Kendi løgfrøðingurin, Frederik Harhoff, sum er settur landsdómari og fremsti danski serfrøðingurin í ríkisfelagsskapinum, sigur, at við at býta yvirvaldsrættin sundur ímillum danir og føroyingar, beindi Schluter fyri eindarríkinum, sum er staðfest í sjálvari grundlógini.

Næstu ferð, Føroyanevndin hjá fólkatinginum hevur fund, skal hon umrøða, antin Harhoff skal boðsendast á fund við nevndina, eins og Poul Schlüter er longu er boðsendur, sigur Ekstrablaðið.

# Høgni Hoydal: Heilt galið

**– Tað, sum danski løgmálaráðharrin nú staðfestir um føroysku undirgrundina, vísi heilt greitt, at vit mugu ongantíð sleppa fólkarættarliga kravin um, sigur Høgni Hoydal**

UNDIRGRUNDIN
*Áki Bertholdsen*



Hetta vísir, hvuss umráðandi tað er, at vit halda fast um okkara sjálvsøgdu mannarættindi, sigur Høgni Hoydal

Nú má tað vera heilt greitt fyri ølllum, at tað er heilt galið við rættarfatanini hjá donskum myndugleikum viðvíkjandi Føroyum.

Tað sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, í eini viðmerking til tað, sum danski løgmálaráðharrin segði um føroysku undirgrundina og sum vit hava greitt frá omanfyri.

– Danir vilja ikki viðurkenna okkara rættarstøðu sum tjóð og harvið ognarrættin til tey ráevni, sum møguliga liggja í undirgrundini. Hetta vísir sostatt, at vit kunnu ongantíð sleppa fólkarættarliga kravinum og veruleikanum, at vit eru tjóð við teimum rættindum, sum fylgja við tí, sigur Høgni Hoydal á heimasíðuni hjá tjóðveldisflokkinum.

Hann sigur, at halda vit okkum til fólkarættin, er undirgrundin ikki ein gáva frá dønum, ið teir síðan kunnu krevja aftur.

– Hinvegin er undirgrundin aldargamla ogn Føroya fólks. Skuldu danir gjørt krav á okkara ogn, er hetta sostatt ikki bert eitt mál millum danskar og føroyskar myndugleikar, men eisini eitt mál fyri altjóða rætt.

Høgni Hoydal sigur, at hetta vísur okkum eisini hvussu umráðandi tað er at staðfesta og halda fast við sjálvsøgdu mannarættindi føroyinga og sjálvsavgerðarrætt okkara sum tjóð.

Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 20-06-95
Km.: 81.000
Prísur: 149.600,- Garanti*

ROVER 420 DIESEL
Skrás.: 30-12-98
Km.: 75.000
Prísur: 158.600,- Garanti*

TOYOTA CAMRY 2,0 GLI (Sýnaður 10-00)
Skrás.: 10-07-91
Km.: 129.000
Prísur: 62.600,-

CITROEN XANTIA
Skrás.: 17-05-96
Km.: 66.000
Prísur: 89.600,-

TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL
Skrás.: 26-03-98
Km.: 42.000
Prísur: 149.600,- Garanti*

SKODA FELICIA
Skrás.: 30-09-96
Km.: 70.000
Prísur: 53.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 GXI L/B (Sýnaður 04-00)
Skrás.: 09-11-95
Km.: 87.000
Prísur: 107.600,- Garanti*

FIAT CINQUECENTO 170
Skrás.: 19-08-97
Km.: 42.000
Prísur: 55.600,-

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN (Sýnaður 03-00)
Skrás.: 30-05-94
Km.: 109.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

BMW 320 I (Sýnaður 12-00)
Skrás.: 06-04-90
Km.: 137.000
Prísur: 57.600,-

TOYOTA COROLLA 1,4 SEDAN
Skrás.: 14-04-00
Km.: 27.000
Prísur: 142.600,- Garanti**

VOLVO 460 SEDAN (Sýnaður 06-99)
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 28-10-97
Km.: 84.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL (Sýnaður 09-00)
Skrás.: 10-01-96
Km.: 80.000
Prísur: 128.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,9 DIESEL STW.
Skrás.: 20-07-00
Km.: 11.000
Prísur: 164.600,- Garanti**

OPEL ASTRA 1,6 I STW.
Skrás.: 03-11-97
Km.: 35.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B
Skrás.: 25-01-99
Km.: 28.000
Prísur: 112.600,- Garanti**

HYUANDAI ACCENT 1,5
Skrás.: 02-01-98
Km.: 25.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B AUTOM. (Sýnaður 03-01)
Skrás.: 21-07-97
Km.: 38.000
Prísur: 105.600,- Garanti*

RENAULT MEGANE 1,6 3 HURÐAR (Sýnaður 09-00)
Skrás.: 22-05-96
Km.: 100.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA H/B (Sýnaður 11-00)
Skrás.: 30-08-95
Km.: 74.000
Prísur: 75.600,- Garanti*

FORD ESCORT 1,6
Skrás.: 22-09-95
Km.: 87.000
Prísur: 74.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B
Skrás.: 30-09-98
Km.: 52.000
Prísur: 115.600,- Garanti**

CITROEN XANTIA DIESEL (Sýnaður 10-00)
Skrás.: 01-06-95
Km.: 266.000
Prísur: 69.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6
Skrás.: 19-11-98
Km.: 15.000
Prísur: 124.600,- Garanti**

MERCEDES 300 DIESEL (Sýnaður 02-00)
Skrás.: 20-10-86
Km.:260.000
Prísur: 69.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 114.600,- Garanti*

DAIHATSU SIRION 5 H AUTOM.
Skrás.: 30-06-99
Km.: 22.000
Prísur: 112.600,- Garanti*

HONDA ACCORD 2,0 LS
Skrás.: 18-06-97
Km.: 113.000
Prísur: 135.600,- Garanti*

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við

STØKK INN Á GÓLVIÐ

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040